

# Norðborg landaði í Norðhavnini

Norðborg landaði 1350 tons av sildafløkum í Norðhavnini í gjár. Í dag skal nótaskipið á nýggjan túr.

Áðrenn teir komu í Norðhavnina at landa, legði Norðborg 300 tons av mjøli og 150 tons av lýsi upp í Fuglafirði.

Eisini tóku teir tungolju í Fuglafirði, áðrenn farið varð til Klaksvíkar, har restin av veiðini varð løgd upp. Størsti partur av veiðini fer til Pólands.

Sildin er fyrí største part fiskað í norskum sjógvi.

# 26.000 føroyingar kannaðir

## CTD 26.000 føroyingar eru nú CTD-kannaðir, og higartil eru 119 tilburðir av sjúkuni staðfestir

Eyðun Klakstein

Ellivu mánaðir eru farnir, síðani kanningar fyri CTD-sjúkuna vórðu settar í verk. Umleið 26.000 føroyingar eru kannaðir síðani tá, og tað svarar til helmingin av íbúgvatalinum í Føroyum. Talan er um persónar í øllum aldri og kring alt landið, sum hava latið seg kannað, og blóðroyndir eru kannaðar á Screening-Labor í Hannover í Týsklandi.

Higartil eru staðfestir 119 tilburðir av CTD-sjúkuni. Av teimum búgva fleiri í Danmark, og sjey persónar eru deyðir á ungum aldri, sum høvdu sjúkuna CTD.

### Kanningar í øðrum londum

Í tíðarskeiðinum er eisini vorðið gjørligt at lata seg kanna fyri CTD í Danmark, Íslandi og Noregi. Harumframt hava fleiri útisetar nýtt høvið at lata seg kanna, tá tey hava vitjað í Føroyum.

Tað er framhaldandi møguleiki at lata seg kanna fyri CTD-sjúku

Til ber at fáa tikið eina blóðroynd á teimum trimum sjúkrahúsunum; á Lækna- og heilsumiðstøðini í Gøtudali og á Heilsumiðstøðini í Vági. Kostnaður fyri kanningina er 100 kr.

# List úr Belarus til Havnar

## Í næstu viku kemur ein bólkur av ungum og børnum úr Hvítarusslandi at dansa og spæla, og tey fara eisini at hava listaframsýning

Mánadagin fær Dansifrøi í Havn vitjan ur Hvítarusslandi.

Dansi hjálparfelagsskapurin "Dinesmindes venner" hevur boðið 42 ungdómum út Hvítarusslandi, og tað er í hesum sambandi, at tey koma til Føroya at vitja í fýra dagar.

Ungdómsbólkurin er úr býnum Brest, ið liggur á markinum millum Pólland og Hvítarussland. Tey flestu av børnunum eru uppvaksin á barnaheimum og kostskúlum.

Hóast korini eru trong, fáa næmingarnir frálæru umframt í vanligu lærugreinum dygga frálæru í list. Men tað eru tey útvaldu, sum sleppa av landinum henda túrin.

Tey koma at dansa og spæla í Føroyum, og haraftrat hava tey eina málningaframsýning við sær. 30 málningar verða til sølu, og teir verða at siggja í Norðoya Sparikassa í Miðlon í Havn.

Um viðrar, fara gestirnir mánadagin kl. 16 at framføra dansir og spøl á parkeringsplássinum framman fyri býráðshúsinum.

Gestirnir skulu harumframt vitja ymsar skúlar í Havn, og teir fara eisini at hava eina almenna framsýning í skúlanum við Løgmannabreyt týskvøldið. kl. 19.30.

# 200 biður um umbering í Íslandi

## Umbering Føroyski rockbólkurin, sum spælir í Íslandi um vikuskiftið, biður nú íslendska forsætisráðharran um umbering fyri viðferðina í Føroyum í summar

Eyðun Klakstein

Um vikuskiftið skal 200 spæla á Iceland Airwaves festivalinum í Reykjavík. Hetta er aðru ferð, at 200 eru bidnir at spæla á hesum festivali.

- Í kjalarvørrinum á ivasomu móttøkuni, sum íslendski forsætismálaráðharrin og kona hennara fingu í Føroyum herfyri, fer 200 at royna at bera í bøtuflaka fyri hetta, siga teir í 200.

- Hóast Jóhanna Sigurðardóttir ikki hevði so nógvar viðmerkingar til hendingina á tíðindafundinum í Føroyum var greitt, at kaldliga móttøkan frá pørtum av okkara poilitisku skipan hevði rakt hana meinari enn hon vildi vera við, siga teir í bólkinum.

- Tí hevur 200 tikið tað á seg at biðja um umbering. Vegna fólkið, landið og tjóðina. Treytaleyst og uttan himpr.

200 heitir við hesum á sendiharra Føroya í Reykjavík um at kunna íslendska forsætismálaráðharran um, at hon og kona hennara eru hjartaliga vælkomnar á 200 konsert í íslendska høvuðsstaðnum leygarkvøldið - og um stundir og hví loyva tí at eta ein døgurðabita saman við bólkinum, meðan hann er í íslandi.

Eisini vil 200 bjóða Jóhonnu at taka ímóti Riddarakrossinum hjá bólkinum.

Áður hava Magni Laksáfoss, Hergeir Staksberg, Anna Kirstin Thomsen, Felix van den Berg og Jóannes Patursson tikið við hesum serstaka heiður.

# Bert 17 sleppa inn samstundis

Listabólkurin FØRKA hevur sítt fyrsta tiltak í Sjónleikarhúsinum í Havn mikukvøldið. Hetta er ein installation við málningum, upplestri av yrkingum og annað.

Av tí at hetta ikki er eitt heilt vanligt tiltak, men stimbrar sansir á fólki á ein heldur øðrvísi hátt,

hava tey, sum skipa fyri, valt einans at sleppa 17 gestum inn í senn, so øll kunnu fáa eina so góða uppliving sum gjørligt.

Tiltakið verður kvørt kvøld í døgunum frá 10. til 31. oktober frá kl. 19.37.

FØRKA er nýstovnaður listabólkur, sum hevur í hyggju at skipa fyri øðrvísi, nýskapandi tiltøkum,

har bert hugflogið setur mørk. Í bólkinum eru: Anna Sofía Egilstrøð, Jytte Joensen, Ellindur Egilstrøð og Jónvá Danielsen


